

Uttan at vera serfrøðingur vil eg halda, at landsvegakervið tykist vera rímiliga væl umhugsað, og at Landsverk hevur í flestu førum farið væl um og fríðkað um lendið. Eg meini sostatt ikki við teir, tað ið eg nú brúki orðið barbarí. Tað var Picasso gamli, ið málbar seg nakað soleiðis: Listin má altsamt royna at vera eitt hanagleiv framman fyri barbaríið. Hon hevur einki annað val.

Nú, orðið list varð nevnt, kann onkur spyrja: Er hetta list? Ein góður spurningur. Orðið list er so misbrúkt og slitið av fótatraðki, kjaftasliti og prentsvertu, at ein aftrar seg við at brúka tað. Men hví seta spurningin – um eitt svar fanst, hvat skuldu vit brúkt tað til? Eftir mínum tykki er orðið so mikið dýrt, at tað eigur bert at verða nýtt í serligum føri – tá ið tað veruliga nýskapandi, sjáldsama og áður ósædda stingur seg upp. Og tað hendir bara við hvørt, tá ið alt fellur væl í lag. Men tá ið eg eygfari figurbólkin við Funningsfjarðarvegin, má eg ásanna, at tann (teir ella tær?) ókendi, ið stílað hevur fyri, í øllum førum hevur havt eitt listarligt eyga.

Vit kunnu siga, at hetta verk við Funningsfjarðarvegin er í slekt við verkið hjá Tróndi Paturssyni, ið stendur framman fyri Útvarpshúsunum. Seks risastórir klettar eru settir saman í eina heild – tveir teirra bera ein triðja, ið liggur tvørturum sum duraásurin hjá Brúsajøkli. Teir einstøku lutirnir finna saman í eina vælproportioneraða veldiga tyngd. Ikki minni væl umhugsað er rúmdin uttanum. Fáar standmyndir í Føroyum hava fingið so væl eydnað pláss. Verkið gagnar umhvørvinum hjá bæði Útvarps- og Norðurlandahúsinum. Men ikki meiri listatos á hesum sinni.

Danski søgumaðurin Peter Thorsen viðgjørdi teir hundraðtals steinar úr fornøld, ið standa víða hvar á Borgundarhólmi. Hann skrivar í 1931: "Tað upprunaliga menniskjað trýr upp á maktina, ikki sum ein persónligan guddóm, men sum ein heilagan mátt, ið kann taka bústað í tí einstaka menniskjanum. Eitt slíkt maktfult menniskja hevur kunnað stýrt náttúrukreftunum – á einum plássi, í einum luti ella tingi, so tað verður heilagt. Vit vita eisini, at upprunafólk mangan trúgva upp á, at steinar, ið hava eitthvørt eyðkent skap, eru bústaðir hjá maktini, og at ein slíkur steinur kann skapa samband við hesa heilagu maktina".

Kanska hava tey hildið seg kunnað, við ymsum orðum og ritualum, lagt ein mátt í steinin, ið kundi verja tann, ið ferðaðist á vegnum. Hetta kann kanska samanberast við, at í katólskum londum hava tey frá elstu tíð brúkt at seta upp krossmerki fram við alfaraveg, til tess at verja tey ferðandi frá øllum illum. Enn síggjast hesi krusifiks manga staðni sunnanfyri, eitt nú í Italia.

So langt søga okkara røkkur, hava norrønu forfedrar okkara funnið sær eyðsýndar steinar, sum teir hava hildið verið verdar at seta upp eftir enda. Hetta er kent úr steinøld, bronsuøld og jarnøld. Vit kenna kuml, beytasteinar og rúnasteinar, sum settir eru til minnis um tey deyðu. Teir hava eina eyðsýnda meining, eins og gravsteinarnir á kirkjugørðunum. Men nú tosa vit ikki um teir, men um steinar, ið ikki eru knýttir at gravstaði ella nøkrum øðrum, men bara eru steinar, ið hava tað skap, ið náttúran hevur givið teimum. Nógv mest er til av teimum. Fornfrøðingar og mannfrøðingar hava lyndi til at knýta alt, ið gátuført er, at trúgv, magi. Hetta kann stundum prógvast, men mangan er tað bara heilaspuni. Fyrst av øllum er fyribrigdið gátuført, vit vita í roynd og veru ikki, hvat ið undir býr. Steinarnir finnast víða hvar, í túsundatali. Felags fyri teir er, at teir eru reistir á ásýniligum støðum, og serstakliga við alfaraveg. Júst sum okkara, ið ókend fólk av ókendari orsøk hava reist so seint sum ímóti endanum á 20. øld.

Vit kunnu staðfesta, at í ansinum hjá føroyskum vegamonnum býr eitt frumgen, ið ber eina gátuføra og sera hugtakandi frumkenslu longri fram á vegin.